# Forskúlin ein góð skúlabyrjan

**At menna børnini til skúlan, er endamálið við forskúlanum í Sankta Frans skúla. Og teir fýra lærararnir, sum arbeiða í forskúlanum, eru ikki eina løtu í iva um, at forskúlin er ein góð skúlabyrjan, sum fleiri enn 40 børn í Føroyum á hvørjum ári áttu at fingið møguleika at byrja í.**
**– Tá ið børn verða seks ár, vilja tey ógvuliga fegin læra. Tey hungra eftir at sleppa at skriva tøl og bókstavir, sigur Anna Hentze, lærari**


*Forskúlabørnini hava skúlagarð saman við 1. og 2. flokki*

SKÚLIN
*Turið Kjølbro*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

At menna børnini til skúlan, er endamálið við forskúlanum í Sankta Frans skúla. At læra børnini at sita still, at lurta, at bera boð heim og at vera saman við øðrum børnum. Dagurin er ikki so knívskorin, sum í einum vanligum skúla, tó har eru greiðar ætlanir frá skúlaársbyrjan um, hvat skal lærast og gerast alt árið.

– Eingin dagur er líka, sigur Jóna Vang, sum hevur arbeitt í forskúlanum í sekstan ár.

Dagurin byrjar við morgunsangi og bøn, eins og í Sankta Frans skúla. Í høvuðsheitum miðar fráløran í forskúlanum ímóti grundleggjandi førleika, at kenna klokkuna, dagarnar, bókstavirnar, tølini, árstíðirnar og so framvegis.

– Spølini, vit hava, arbeiða við tølum og mongdum, og tí læra tey smá roknistykki, sigur Jóna Vang.

– Kenna børnini bókstavirnar sum seks-sjey ára gomul, læra tey at seta teir saman til orð, men annars læra vit tey ikki at lesa. Tey eru ógvuliga forvitin eftir at læra og tá ið tey hava lært bókstavirnar, vilja tey bara arbeiða við teimum og leggja annað til viks. Seinna hálva árið síggja vit ógvuliga væl, hvørji børn eru skúlabúgvin. Barnagarðarnir gera í dag eitt stórt arbeiði, hava skúlabólkar og annað, men nógv børn tíma ikki so væl at fara í barnagarð seinasta árið áðrenn skúla. Tá er forskúlin eitt gott tilboð, sigur Gunvør á Lava, ið hevur verið á skúlanum í 22 ár.

– Tá ið børn verða seks ár vilja tey ógvuliga fegin læra. Tey hungra eftir at sleppa at skriva tøl og bókstavir, sigur Anna Hentze, sum hevur verið lærari í forskúlanum í seks ár.

Ferðslulæran er týðandi partur av frálæruni, og av tí, at einki frálærutilfar er til á føroyskum til hetta aldursstigið, skipa lærararnir sjálvir fyri, hvussu undirvíst verður í ferðslu.

– Vit hava okkurt tilfar, men høvuðsparturin er at vera úti í ferðsluni. Har læra tey best, hvussu tey eiga at bera seg at, sigur Gunvør á Lava.

Farið verður eisini nágreiniliga ígjøgnum onnur evni, so sum bíbliusøgu, náttúru, sunnan mat, sunnar tenn og almenna vitan annars.

## Stuttur dagur

Forskúlin er bert tríggjar tímar um dagin, frá klokkan átta á morgni, og tað er heldur lítið, heldur Gunvør á Lava.

– Av tí, at fyrsti flokkur bert er í skúla tríggjar tímar um dagin, kunnu forskúlabørnini ikki verða longur, sigur hon.

Forskúlabørnini hava skúlagarð saman við 1. og 2. flokki, og eru annars saman um øll tiltøk, sum fara fram á skúlanum.

– Á tann hátt læra børnini at vera saman við nógvum børnum og at koma at kenna fleiri børn. Skúlin er stórur, børnini og lærararnir nógvir. At gera børnini trygg við skúlan, skúlaumráðið og lærararnar, er ógvuliga umráðandi, sigur Anna Hentze.

Av tí, at forskúlin í Sankta Frans skúla er einasti forskúlin í landinum, mugu lærararnir á skúlanum sjálvir skipa og evna tilfarið. Gjøgnumgangandi verður nógv brúkt aftur, men teir kaga eisini eftir, hvat verður brúkt í Danmark.

– Vit hava gjørt okkara egna leist, og gjørt broytingar so hvørt, tað hevur verið neyðugt. Men tað hevði verið ógvuliga gott og mennandi, um onkur annar forskúli var, sum vit kunnu samanbera okkum við og samstarva við, sigur Gunvør á Lava.

## Betur fyri

Nunnurnar hava sum vera man ávirkað skúlan nógv, eisini forskúlan, men av tí, at eingin teirra longur arbeiðir í forskúlanum, eru vanarnir og siðvenjan frá teimum við at glíða út. Tó okkurt er, sum er eftir.

– Tað mesta av tí katólska, sum eyðkendi skúlan fyrr, er burtur í dag. Vit halda tó enn Sankta Frans dagin 4. oktober, og disiplinin, sum altíð hevur eyðkent skúlan, halda vit fast við, sigur tær allar, og eru samdar um, at soleiðis eigur at vera.

– Okkara skúli verður væl virdur av næmingunum, hann verður aldri maksaður, sum aðrir skúlar, børnini fara úr skónum inni og tílíkt. Á henda hátt er disiplinin enn sum áður, sigur Jóna Vang.

– Vit hava valt at hildið fast við disiplinina, tí hon er góð fyri børnini. Hesi árini, eg havi arbeitt á skúlanum, eru børnini broytt nógv. Í dag eru tey nógv meiri opin og vita nógv meiri. Av tí sama krevja tey nógv meiri av okkum, sigur Gunvør á Lava, sum hevur arbeitt saman við fleiri nunnum.


*Forskúlaflokkur*


*Forskúlin roynir seg fyri fyrstu ferð við framsýning av lutum og øðrum, børnini hava gjørt ígjøgnum árið*




*At sita still og lurta, er eitt av endamálunum við forskúlanum*



Anna Hentze, sum er útbúgvin lærari og ikki hevur arbeitt saman við nunnunum, sigur, at av tí, at nógvir nýggir lærarar eru komnir inn á skúlan og fólkaskúlalógin er nýggj, henda broytingar alla tíðina.

– Tað er púra natúrligt, at okkurt hongur eftir frá tíðini, nunnurnar vóru her, men vit endurnýggja okkum eisini alla tíðina, sigur hon.

Kanningar, sum eru gjørdar uttanlands, hava víst, at børn, sum ganga í forskúla, er meiri skúlabúgvin enn tey, ið ikki fáa hendan møguleikan.

– Lærarar her siga, at børn, sum hava gingið í forskúla, eru meiri klár til skúlan, og duga betur at bera seg at í skúlanum og saman við øðrum. Tað er sjálvsagt ymiskt, hvussu børn eru fyri, og tí kunnu vit ikki siga sum heild, at forskúlabørn læra betur og skjótari, enn tey, sum ikki ganga í forskúla.

– Vit ivast ikki í, at forskúlin er ein góð skúlabyrjan, sigur Unn Mohr, sum arbeiðir sum avloysari í forskúlanum.

## Gloymdur partur

Forskúlin í Sankta Frans skúla hevur umleið hálvt hundrað ár á baki. Skúlin heldur til í kjallarahølum á skúlanum, og sum skilst er ætlanin at útvega forskúlanum meiri tíðarhóskandi høli. Tveir flokkar eru á hvørjum ári við umleið 20-24 børnum. Fyri nøkrum árum síðani var gravgangurin eftir at sleppa í forskúla ógvuliga stórur, bíðilistin langur, men síðani fleiri barnagarðar eru komnir og hesir hava skúlabólkar fyri børn beint undir skúlaaldur, er áhugin fyri forskúlanum minkaður nakað. Tilgongdin er í øllum førum ikki so stór, sum hon hevur verið.

– At forskúlin og frítíðarskúlin fylgja við skúlanum og hava frí, tá ið skúlin hevur frí, setir nógv foreldur í eina tvístøðu vegna vantandi ansing. Ikki øll forskúlabørnini hava frítíðarskúlapláss heldur og skúladagurin er stuttur. Tískil rokni eg við, at nógv foreldur aftra seg við at lata børnini fara í forskúla av hesum ávum, sigur Gunvør á Lava.

– Barnagarðarnir gera meiri í dag saman við børnunum, eisini teimum, sum eru beint undir skúlaaldur, og tað er heilt vist ein orsøk til minkandi tilgongdina. Harvið ikki sagt, at forskúlin verður óneyðugur, sigur Anna Hentze.

Upprunaliga er forskúlin ætlaður til børn, sum skulu ganga í Sankta Frans skúla. Hesum er farið burtur frá, og tí fara nógv av forskúlabørnunum út í øll heraðshorn í býnum og kommununi. Hetta er eitt sindur óheppið, halda lærararnir.

– Vit kundu sjálvandi hugsað okkum, at børnini halda fram í Sankta Frans skúla, sigur Jóna Vang.

## Framsýning

Í hesum døgum er framsýning á skúlanum, har børnini sýna fram, hvat tey hava gjørt í árinum, bæði í evning og øðrum. Lutir, bøkur, upphang og mangt, mangt annað, sum er gjørt farna árið, verða víst fram fyri foreldrum, avvarðandi og næmingum á skúlanum.


*Matpakkin verður etin*


*Sunnur matur er eisini á skránni hvørt ár*





